# Eftir nýggju brúnni í januar

**Arbeiðið við at gera nýggju brúnna um Fossá verður liðugt um tveir mánaðir**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*

**Haldórsvík:** Verkætlanin fevnir um gerð av eini aðrari brúgv enn teirri gomlu, sum tíðin er farin frá.

Fossá liggur sunnanfyri Haldórsvík og skal nýggj brúgv gerast um hana, samstundis sum landsvegurin suður ímóti grannabygdini Langasandur verður umlagdur.

Á heimasíðuni hjá Landsverki verður sagt, at trupulleikar hava verið í arbeiðinum at gera ein fyribilsveg omanfyri brúnna. Nú eru løgd fleiri og størri rør í ánna.

- Síðani verður gamla brúgvin tikin niður og betongarbeiðið kann byrja, verður sagt.

Ætlanin er, at arbeiðið skal gerast so mikið liðugt í ár, at koyrandi verður eftir teirri nýggju brúnni seinast í januar mánaði komandi ár.

Kostnaðarætlan fyri arbeiðið er 2,9 mió. krónur.



*Brúgvin um Fossá hevur slitið fyri seg, og verður nú avloyst av eini nýggjari*

*Mynd: landsverk.fo*

## 10 byggiloyvi til miðvingar

**Miðvágur**: Rættiliga nógv virksemi er í bygdini í hesum døgum. Serliga sæst hesin aftur á Kirkjabø, har byggingin hevur tikið rættiligt dik á seg.

- Fleiri stykkir eru útgrivin og okkurt hús er longu komið upp, verður sagt úr Miðvágs kommunu.

Í farnu viku sóust tvær maskinur lið um lið á hvør sínum stykki, so nú má sigast at gongd er komin á.

Eini 10 byggiloyvir eru útskrivaði, so komandi vár standa helst fleiri hús uppi á Kirkjabø. Tað strandar mest uppá arbeiðsmegi, skilst á onkrum av eigarunum.



# Ynskja samstarv við íslendska kommunu

**Fyrr í mánaðinum vitjaðu umboð fyri Sunda kommunu hjá Sveitarfélagnum í Hornafjarðar kommunu í Íslandi**

KOMMUNUR
*Snorri Brend*

**Sundalagið:** Endamálið við ferðini, sum vardi í tveir dagar, var at kunna seg um gongdina í Hornafjarðarøkinum, nú meira enn tíggju ár eru liðin síðan kommunusamanleggingarnar byrjaðu har.

Eins og í Sunda kommunu vóru tað seks kommunur, ið løgdu saman, tó í tveimum umførum. Í økinum búgva tilsamans 2300 fólk, harav tey 1700 í Høfn.

Eitt av kvøldunum bjóðaði Sveitarfélagið til døgverða, og hin dagin var vitjað á ymsum stovnum í kommununi.

- Høvi var at síggja dagstovnar, skúlar og heilsutænastur, og hornfirðingar lata væl at gongdini, verður sagt á heimasíðuni hjá Sunda kommunu.

### Samstarv

Í Hornafirði hava tey samskipað skúlarnar í kommununi, so teir nú virka á einum felags støði. Ein sonevndur vitanardepil er bygdur, har bókasavn, miðnámsskúli, hægri útbúgvingar og íverksetaramiðstøð halda til.

- Hesin stovnur, ið ber navnið Nýheimar, er eitt sera áhugavert dømi um, hvussu nógv kann koma burturúr, tá allar góðar kreftir lyfta í felag, staðfesta umboðini úr Sunda kommunu.

Kommunan hevur gjørt avtalu við landsmyndugleikarnar um at reka heilsutænasturnar – eldrarøkt, dagtilhald, læknar, heilsufrøðingar, jarðarmóðir og eina bráðmóttøku. Hesar tænastur eru eisini samskipaðar og virka eftir øllum at døma væl.

Vinnulívið í kommununi er í stóran mun grundað á fiskivinnuna, men roynt verður at fáa nýggjar vinnur at taka við, eitt nú ferðavinnuna, sum roynir at menna so soleiðis, at tíðin, tá ferðafólk vitjar kemur at fevna um alt árið. Hesum síggja fólk í Hornafjarðarøkinum stórar møguleikar í.

Ætlanin er, at ferðin skal verða byrjanin til samstarv millum báðar kommunurnar, og væntandi koma umboð úr Hornafirði at vitja Sunda kommunu komandi summar.

Tað er eyðsæð, at kommunurnar hava nógv er til felags, sum samstarv kann byggjast á.

- Tað spurdist nógv áhugavert burturúr ferðini, sum fer at verða til gagn fyri framtíðar arbeiðið í kommununi, segði táverandi borgarstjórin í Sunda kommunu, Heðin Zachariasen eftir ferðina.

Síðani ferðina er hann vorðin landsstýrismaður í innlendismálum fram til løgtingsvalið í januar mánaði. Nýggi borgarstjórin, Árni Dam tekur við starvinum í dag, og sum eykalimur kemur Sunniva Kollslíð í bygdaráðið.